## DAGSINS MEINING

# Menningarhjálpin

Um man skal taka dagar ímillum hesa samgonguna og undanfarnu, so má sigast, at høvuðsmunurin er lutfallið millum retorikk og handling. Nógv ár hevur verið tosað um, hvussu føroyska samfelagið átti at tikið sína støðu í alheimssamfelagnum meira álvarssamt og at landið átti at gjørt sína skyldu og latið eina trivaliga upphædd til menningarhjálp. Nú verður so endiliga handlað og løgmansskrivstovan søkir í hesum døgum eftir fulltrúa at samskipa hetta arbeiðið.

Fólk eru á ymiskum máli um hvørt menningarhjálp skal latast, má tí tað eru bólkar í føroyska samfelagnum, sum ikki fáa ta hjálp teimum tørva. Tá tað er sagt, so krevst hóast alt, at vit seta tingini í perspektiv. Eingin í Føroyum doyr í hungri, eingin er í akuttum vanda fyri at fella fyri eini kolerafarstótt, og ikki ganga túsundtals børn foreldraleys vegna kríggj og sjúku. Hóast tað eru vanlukkuligar lagnur í Føroyum, so vilja tær uttan mun til hvussu greflig dømi eru, fána burtur í mun til hvat meginparturin av heimsins íbúgvum má draga seg ígjøgnum dagliga. Tí er tað ein sjálvfylgja,at vit skulu lata eina upphædd í menningarhjálp, sum í minsta lagi svarar til upphæddina, ið grannalondini lata. Men tað skal ikki forða fyri, at vit taka hond um heimligar trupulleikar eisini.

Eitt er so upphæddin til menningarhjálp. Eitt annað er mátin. Danir hava í áravís havt DANIDA. Hetta er menningarhjálp har danskar og eisini føroyskar fyritøkur eru farnar út í heim at gera arbeiði fyri danskar pengar. Hetta hevur m.a. givið føroyskum fyritøkum møguleika at arbeiða uppá ferju í Afrika og hevur eisini givið føroyskum einstaklingum møguleikan at brúka sína vitan og sín førleika í hesum hjálparbeiði.

Veljast kann sjálvsagt bara at lata eina upphædd til altjóða felagsskap, sum so letur hana víðari. Hetta er ivaleyst skilagott, tá talan er um bráfengishjálp, sum vit sóu tað í sambandi við ræðuligu flóðalduna í Suðureysturasia herfyri. Tá talan er um ta menningarhjálpina, sum vit ætla at lata á hvørjum ári, tá er spurningurin, um vit ikki áttu at umhugsað eina DANIDA-líknandi skipan, har føroyskar fyritøkur fara fyri landsins rokning út at umvæla skip, byggja skúlar, barnaheim ella hvat tað kann vera. Tað er eitt sindur niðurlátandi, um føroyingar hugsa, at alt bara gongur ein veg sum ein olmussa til fátæk lond. Gamaní er talan um eina hjálp frá einum í heimshøpi ríkum landi til menningarland, men sum DANIDA hevur víst, so kann eisini ómetaliga nógv fáast burtur úr báðar vegir. Menningarlond eru eisini potentiell samhandilslond og útflyta stórar nøgdir av ráværu til ídnaðarlondini og kunnu eisini hjálpa føroyskari vinnu til at gerast meira útatvent, og eingin ivi er um, at vit kunnu læra nógv av at samstarva og vónandi eisini í framtíðini samhandla meira við menningarlond.

Hetta er ikki minst aktuelt í hesum tíðum, har ES stuðlar egnum landbúnaði og harvið undirminerar allan tann traditionella útflutningin hjá nógvum menningarlondum. Umráðandi er at vit byrja rætt og brúka so lítið av peningi sum møguligt til óneyðuga umsiting. Umsitingarkostnaðurin skal altíð kunna standa mát við upphæddina, ið latin verður. Gott at skjøtil nú verður settur á og spennandi verður at síggja, hvussu Føroyar koma at skipa sína menningarhjálp.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kr. 0,50

**Petur í Gong**
*Formaður í Brúkarasamtakinum*

Seinasta snaringin í málinum um brúkaragjaldgjald á nýtslu av dankorti er nú av løgnum orsøkum vorðið til eitt trætumál millum Keypmannafelagið og Kappingarráðið. Sjálvur hugsi eg hví í ólukkan júst hesir partar eru farnir at trætast um hesi fimmti oyruni. Hevði tað ikki verið rættari um myndugleikarnir fingu avgreitt málið? Hetta kundi t.d. verðið gjørt við at slóða fyri einari føroyskari lóg um gjaldskort. Ella í ringasta føri við at biðja um at fáa ta donsku lógina setta í gildi her. Tí sum er, er eingin tílík lóg galdandi fyri Føroyar. Og tá dugi eg ikki at síggja annað enn, at peningastovnar og handlar kunnu gera sum teimum lystir.

Í donsku lógini er heilt greitt útgreinað hvussu gjald kann ásetast, og at hetta gjaldið í mesta lagi má vera kr. 0,50. Hesum lógarteksti hava føroyskir peningastovnar av fríðum vilja valt at fylgja. Teir kundu lati vera, ella teir kundu kravt kr. 5,00. Tað avgerða teir einsamallir.

Einasta fráboðan frá almennu Føroyum um gjaldskort er tá Løgtingið í 1997 samtykti ríkislógartilmæli um gomlu donsku lógina um gjaldskort, sum setti forboð móti brúkaragjaldi. Hóast hetta er danskt ábyrgdarøki, og lógin ongantíð varð sett í gildi fyri Føroyar, kunnu vit siga, at Løgtingið hevur úttalað seg. Men peningastovnar hava heldur valt at fylgja nýggju donsku lógini.

Tað kann tí tykast sum um hetta gjaldið endar sum ein kastibløka millum skiftandi partar í tí almenna kjakinum heilt til tann dag, har tann almenni myndugleikin ger sína skyldu, og fær sett í gildi eina greiða lóg um gjaldskort.

# Go Go í Rex



**Í kvøld verður útgávukonsert við Go Go Blues á nýggja dansistaðnum Rex í Havn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*Dagfinn@sosialurin.fo*

Go Go Blues gv fyri stuttum út fløgu við bluestónleiki. Í hesum sambandi verða útgávukonsertir og tann fyrsta verður í Havn í kvøld, fríggjakvøld. Henda verður í nýggju hølunum, ið kallast Rex. Hetta er fyrrverandi Platform.

Fleiri útgávukonsertir verða næstu vikurnar kring landið og bólkurin verður eisini við í Prix Føroyar kappingini.

## Gjald fyri valgreinar

Tað er nú greitt, at fólkatingsval verður 8. februar í ár. Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka pengar fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið.

Enn er freistin fyri at lata vallistar inn ikki lokin, men frá og við Vikuskiftisblaðnum komandi fara vit at taka pening fyri greinar, sum beinleiðis eru tengdar at valstríðnum. Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.